Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	29. sept. 2023
Mál nr.:	23/18108-10
Málsviðgjørt:	HP
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	22.09.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.
(Fleiri fráverudagar vegna sjúku afturrindast av arbeiðsgevara)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 29 frá 11. mars 2022, verður í § 20, stk. 2 “1. og 2. fráverudag” broytt til: “1. til og við 7. fráverudag”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Samfelagið og vælferðarskipanir eru ment og broytt, síðani løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (eftir hetta dagpeningalógin) kom í gildi, og tað hevur í eina tíð verið tørvur á at endurskoða ta meira enn 20 ára gomlu løgtingslógina. Fyrsti partur av endurskoðanini varð samtyktur í Løgtinginum á vári 2022, og landsstýrið fer nú undir at fyrireika ymsar aðrar broytingar. Í hesum uppskoti verða fleiri fráverudagar lagdir til arbeiðsgevarar at rinda, og seinni er ætlanin at bøta um rættindi hjá smærri arbeiðsgevarum á privata arbeiðsmarknaðinum, sum hava starvsmenn í starvi.

1.2. Galdandi lóggáva

Dagpeningalógin er frá 2001, men ásetingin um, at arbeiðsgevarar skulu afturrinda landskassanum fyri 1. og 2. fráverudag, kom við løgtingslóg nr. 66 frá 2. mai 2003 sum liður í sparingum í fíggjarlógini fyri 2003. Spurningurin um arbeiðsgevaragoldnar fráverudagar varð tó viðgjørdur í áliti frá 16. februar 2000 um nýggja dagpeningalóg. Dagpeningalógin er ikki broytt síðani 2003 hesum viðvíkjandi, hóast tað fleiri ferðir hevur verið umrøtt í politisku skipanini at hækka arbeiðsgevaragoldna fráverudagatalið.

Fíggingin av dagpeningi til løntakarar er ásett í § 20 í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. Høvuðsreglan er, at dagpeningurin verður goldin av landskassanum, men at arbeiðsgevarar afturrinda tær útreiðslur, sum standast av, at Almannaverkið rindar 1. og 2. fráverudag, tó undantikið har ongin arbeiðsgevari er, t.d. um viðkomandi fær arbeiðsloysisstuðul frá ALS.

Dagpeningahámarkið fyri ein dag í tíðarskeiðnum 1. mai 2023 til 1. mai 2024 er 1.039 kr., íroknað frítíðarløn. Fyri eina sjúkrafráveru er tað tí í mesta lagi 2.078 kr., sum arbeiðsgevarin skal rinda. Í talvuni niðanfyri síggjast samlaðu útgjøldini vegna dagpening og arbeiðsgevarans partur fyri 1. og 2. fráverudag.

	2018	***2019***	*2020*	*2021*	*2022*	***J 2023***
Útgjald til løntakarar	68.945	77.866	91.685	93.775	108.322	90.112
Arbeiðsgevarans partur	-5.022	-5.489	-5.485	-5.449	-5.806	-5.857
Netto	***63.923***	***72.377***	*86.200*	*88.326*	*102.516*	***83.755***

Viðmerking: Árini 2020-22 vóru merkt av koronu, og tí vóru útreiðslurnar til dagpening óvanligar hesi árini

Arbeiðsgevarans partur av útreiðslum til dagpening til løntakarar er vanliga gott 7 prosent.

Í mun til hini Norðurlondini er føroyska skipanin við sjúkradagpeningi serlig. Hóast skipanirnar líkjast, eiga tær ikki at samanberast generelt. Í hinum londunum hava løntakarar rætt til løn ella veiting við sjúkrafráveru. Hvussu nógv og hvussu leingi er treytað av støðuni, sum løntakarin hevur á arbeiðsmarknaðinum. Høvuðstreytirnar fyri løntakarar í londunum líkjast, hóast økini eru skipað ymiskt.

Í Føroyum eru, í mun til okkara grannalond, tvær ymiskar skipanir, tá tað snýr seg um dagpengar vegna sjúku. Onnur er fyri tímalønt, og hin fyri starvsmenn og tey, sum sambært sáttmála hava rætt til løn undir sjúku.

Hjá tímaløntum rindar Almannaverkið sjúkradagpening beinleiðis til arbeiðstakaran frá fyrsta fráverudegi. Tó er galdandi skipan, at arbeiðsgevarin endurrindar tí almenna útreiðslurnar fyri 1. og 2. fráverudag. Fyri starvsmenn og tey, sum hava rætt til løn undir sjúku, rindar arbeiðsgevarin fulla løn alt sjúkuskeiðið.

Í mun til treytirnar hjá arbeiðsgevarum, er føroyska skipanin sum nevnt serstøk í norðurlendskum høpi. Í hinum Norðurlondunum hava arbeiðsgevarar skyldu til at gjalda fulla løn í eitt sokallað arbeiðsgevartíðarskeið. Eftir arbeiðsgevaratíðarskeiðið er tað í høvuðsheitum soleiðis, at arbeiðsgevararin heldur fram at gjalda vanliga løn, ella okkurt slag av sjúkraløn, (t.d. dagpengasats), men tá fær arbeiðsgevarin eftirrindað ein dagpengasats frá tí almenna.

Arbeiðsgevaratíðarskeiðið í ymsu Norðurlondunum er millum 10 og 30 dagar, og munur verður ikki gjørdur á, um talan er um tímalønt, fastløntar starvsmenn o.s.fr. Niðanfyri er talva við yvirliti av arbeiðsgevaratíðarskeiðnum í ymsu Norðurlondunum. Upplýsingar í talvuni eru høvuðsreglur, og tað merkir, at í serligum førum kunnu treytirnar vera øðrvísi (t.d. tá løntakarin hevur verið í starvi í stutta tíð).

Arbeiðsgevaratíðarskeið í Norðurlondum

Føroyar	Danmark	Finnland	Ísland	Norra	Svøríki
2 dagar	30 dagar	10 yrkadagar	1 mðr.	16 dagar	2 vikur

Tá tað snýr seg um arbeiðsgevarar hjá tímaløntum, kann sostatt staðfestast, at tað áliggur arbeiðsgevarunum í okkara grannalondum at rinda fyri munandi fleiri dagar enn hjá arbeiðsgevarum í Føroyum. Tó rinda arbeiðsgevarar í Føroyum, sum hava starvsfólk, sum ikki eru fevnd av dagpeningaskipanini, løn undir sjúku frá 1. degi og fáa onki endurrindað frá tí almenna, og hava hesi sostatt verri treytir enn arbeiðsgevarar í øðrum londum.

Teir vinnubólkar, sum fáa dagpengar eftir hesi løgtingslóg, eru í høvuðsheitum innan fiskivinnu, byggivinnu, handverk og reingerð, og í ein ávísan mun innan handilsvinnu (hjá teimum, ið arbeiða minni enn 20 tímar um vikuna fyri sama arbeiðsgevara).

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at lækka útreiðslur landskassans. Størri fíggjarlig byrða verður í størri mun løgd á arbeiðsgevaran.

Lógaruppskotið broytir treytirnar hjá teimum arbeiðsgevarum, sum eru fevndir av dagpeningaskipanini, soleiðis at teir skulu endurrinda landskassanum fyri upp til 7 fráverudagar, heldur enn tveir. Við uppskotinum verða soleiðis 5 dagar aftrat lagdir út til arbeiðsmarknaðin aftrat teimum tveimum sambært galdandi løgtingslóg. Arbeiðsgevarans partur av samlaðu útreiðslunum til dagpening vegna sjúku, sum í dag er umleið 7 prosent, fer at hækka til umleið 23 prosent.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Í staðin fyri at endurrinda 1. og 2. fráverudag skal arbeiðsgevarin sambært uppskotinum endurrinda fyri 1. til og við 7. fráverudag, og t.v.s., at arbeiðsgevaraparturin hækkar úr 2 upp í 7 dagar.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er ikki sent til ummælis, tí talan er um fylgilóg til fíggjarlógaruppskotið fyri 2024, og tað hava ikki verið stundir at senda til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Talvan niðanfyri vísir eina meting av samlaðu útreiðslunum av hvørjum fráverudegi, t.v.s. útreiðslurnar av 1. degi í øllum sjúkrafráverum, útreiðslurnar av 2. degi í øllum sjúkrafráverum o.s.fr.

Dagur	*Útreiðslur pr. dag (tús. kr.)*	*Útreiðslur lagdar saman (tús. kr.)*	***Sparing hjá landskassanum (tús. kr.)***
1	3.081	3.081	
2	3.005	6.085	
3	2.914	9.000	**2.914**
4	2.808	11.808	**5.722**
5	2.608	14.415	**8.330**
6	2.517	16.932	**10.846**
7	2.327	19.260	**13.174**

Útreiðslur hjá landinum fyri 1. og 2. dag verða afturrindaðar av arbeiðsgevara. Talvan omanfyri skal sostatt lesast soleiðis, at t.d. útreiðslur landskassans fyri 1. dag er 3.081 tús. kr. og fyri 2. dag 3.005 tús. kr. Tilsamans er tað útreiðslur á 6.085 tús. kr. Útreiðslur til 3. dag kosta landskassanum 2.914 tús. kr., og um arbeiðsgevarar skulu rinda hesa upphæddina aftur, so verður tað ein sparing fyri landskassan.

Talvan omanfyri skal takast við fyrivarni. Almannaverkið hevur upplýst, at nakrir løntakarar, sum móttaka dagpening, ikki hava ein arbeiðsgevara, og tá verður arbeiðsgevaraparturin ikki kravdur inn. Hetta ger, at upphæddirnar í talvuni í veruleikanum verða eitt vet lægri.

Talvan tekur støði í hagtølum um sjúkrafráveru frá 2019, og ein miðal dagpengaupphædd higartil 2023 er brúkt til at rokna upphæddirnar. Hagtøl fyri árini 2020, 2021 og 2022 eru merkt av korona og verða mett ikki at geva eina mynd av gongdini frameftir. Fólkatalið í Føroyum er vaksið síðani 2019, og tað eru nú fleiri á arbeiðsmarknaðinum.

Uppskotið hevur við sær, at útreiðslur landskassans til dagpening vegna sjúku leysliga mett fara at lækka við uml. 13 mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Við uppskotinum fara arbeiðsgevarar at rinda fyri sjúkufráverur í upp til og við 7 fráverudagar. Við støði í meting fyri 2019 verður mett, at útreiðslurnar hjá arbeiðsgevarunum hækka við

umleið 13 mió.kr. Tó mugu tølini lagast til støðuna í tí einstaka árinum, t.d. lønarvøkstur, tal av sjúkuskeiðum o.s.fr.

Við galdandi løgtingslóg skal ein arbeiðsgevari í mesta lagi gjalda 2.078 kr. til Almannaverkið í sambandi við hvørt sjúkuskeiðið. Frameftir skal ein arbeiðsgevari í mesta lagi gjalda 7.273 kr., um starvsfólkið hevur 7 fráverudagar.

Uppskotið verður ikki mett at hava umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógartryggjað rættindi hjá løntakarum verða óbroytt, og løntakarin fer framhaldandi at hava rætt til dagpening vegna sjúku frá 1. fráverudegi. Fyri borgarar, sum ikki hava góða heilsu, kann tað tó gerast truplari at fasthalda tilknýti til arbeiðsmarknaðin, tí løntakarar, sum ofta hava sjúkrafráveru, verða dýrari fyri arbeiðsgevaran.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri skyldur Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum, Evropeiska mannarættindasáttmálanum ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrifólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Sambært galdandi løgtingslóg hevur løntakarin rætt til dagpening vegna sjúku frá 1. fráverudegi. Tað er Almannaverkið, ið rindar dagpeningin beinleiðis til løntakaran. Almannaverkið sendir síðani krav til arbeiðsgevaran fyri útreiðslur fyri 1. og 2. fráverudag. Hetta lógaruppskotið hevur við sær, at frameftir skal arbeiðsgevarin afturrinda útreiðslur, ið standast av 1. til og við 7. fráverudagi.

Uppskotið hevur ikki við sær aðrar broytingar, og skipanir og mannagongdir í sambandi við málsviðgerð annars eru óbroyttar.

Til § 2
Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2024.

Almanna- og mentamálaráðið, 29. september 2023

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur